


*Higartil í vetur hava menninir hjá ÍF vunnið allar seks ferðirnar, teir hava spælt ímóti Mjølni, so tí má ÍF liva við leiklutinum sum favorittur undan mansfinalunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# ÍF hevur havt munin

**MANSFLOGBÓLTUR** Fuglfirðingar hava vunnið allar dystirnar ímóti Mjølni í vetur, men í steypafinaluni vístu teir í Mjølni, at teir saktans kunnu spæla við

**Hilmar Jan Hansen**

Á pappírinum er ikki yvir at dylja, at fuglfirðingar eru favorittar undan FM-finalunum ímóti Mjølni, tí ÍF hevur verið langt framman fyri øll hini mansliðini alt kappingarárið. Og hóast Mjølnir fekk trýst ÍF í steypafinaluni, sum mátti upp í fimm sett, er tað altso ÍF, ið kann vinna greipuna um vikuskiftið.

– Hjá okkum hevur venjinging verið meira taktiskt síðstu dagarnar, tí vit vita, at Mjølnir kann spæla væl. Nú er so langt síðani, at vit vistu, at vit komu í finaluna, men nú tað nærkast, eru vit ordiliga klárir og sjálvandi eisini spentir. Eg trúgvi, at tað verður okkara fyrimunur, at vit hava fleiri streingir at spæla uppá enn Mjølnir, sigur Rúni Weihe í ÍF.

Sigast má, at ÍF hevur í vetur gjørt slætt borð í øllum dystunum ímóti Mjølni, tí ÍF hevur vunnið allar fimm landskappingardystirnar, umframt steypafinaluna. Kortini hava mong jøvn sett verið, og av teimum tilsamans 24, liðini hava spælt, er eitt endað 31-29, eitt 30-28, tvey 29-27 – enntá í sama dysti! – og eitt 26-24.

– Vit vita væl av, at ÍF er favorittur, men eg haldi slett ikki, at munurin er so stórur á okkum og teimum, sum mong gera tað til. Tá vit spæla upp til okkara besta, eru vit betri enn teir. Vit mugu bara fáa alt at koyra, tí tað krevst, skal tað eydnast at vinna á ÍF, sum hevur havt munin á okkum í allan vetur, sigur Thorvald Danielsen í Mjølni.

Tummas Óli Mortensen verður fyrsti dómari í báðum mansfinalunum, har hann í morgin hevur Óla G. Samuelsen sum annan dómara og sunnudagin Rúni Hentze.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Dystir um vikuskiftið:

**EIKLIGAN, FM-FINALUR Á EIÐI**

| | | |
|---|---|---|
| 26/03 | 15.00 | Fleyr-Mjølnir (kvinnur) |
| 26/03 | 17.00 | ÍF-Mjølnir (menn) |
| 27/03 | 15.00 | Mjølnir-Fleyr (kvinnur) |
| 27/03 | 15.00 | Mjølnir-ÍF (menn) |

**STÓRSTEYPADYSTUR Í GUNDADALI**

| | | |
|---|---|---|
| 27/03 | 16.00 | HB-EB/Streymur |

**SUNSET-KAPPINGIN**

| | | |
|---|---|---|
| 26/03 | 17.00 | StÍF-Neistin |
| 27/03 | 14.30 | Kyndil-VB |
| 27/03 | 15.00 | Tjaldur-Stjørnan |

# Tvey jøvn kvinnulið




*Fleyr og Mjølnir eru tvey sera jøvn lið, so tí kunnu helst væntast tvær spennandi og tættar FM-finalur teirra millum um vikuskiftið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**KVINNUFLOGBÓLTUR** Væntast kunnu tvær spennandi finalur millum kvinnurnar hjá Fleyr og Mjølni um vikuskiftið, tí liðini eru sera jøvn og passa væl saman í spælistíli

**Hilmar Jan Hansen**

Kvinnurnar hjá Mjølni hava um vikuskiftið møguleikan at vinna greipuna, um tær vinna á Fleyr í FM-finalunum, tí longu frammanundan hevur Mjølnir jú vunnið steypakappingina. Hinvegin hevur Fleyr møguleikan at vinna fyrsta meistaraheitið hjá kvinnunum síðani 1997!

– Vit eru spentar og hava roynt at vant, sum spældu vit ímóti Fleyr. Nú hava vit kjansin at fara við greipuni, og tað ætla vit eisini. Hetta eru tvey rættiliga jøvn lið, so eg vænti tveir dystir við nógvum og góðum álopsspæli, har tað liðið vinnur, ið torir betur, sigur Eina Kalsø í Mjølni.

Fleyr hevur havt munin á Mjølni í vetur við einum 3-2 og einum 3-1 sigur, meðan Mjølnir hevur vunnið eina ferð 3-1. Men serliga í síðsta dystinum tóktust liðini jøvn, og har endaði eitt sett 26-24 og eitt 27-25.

– Sjálvandi eru allar øgiliga spentar, nú vit eru í einari FM-finalu, men tað hevur ikki ávirkað venjingina nakað serligt hesa vikuna. Vit kunnu ikki byrja upp á nakað nýtt nú, men fara at gera tað, sum hevur verið nóg mikið til at fáa okkum í finaluna. Eg trúgvi, at tað liðið, sum kemur betur frá byrjan, fer at vinna, sigur Rakul Dalsgaard Jakobsen í Fleyr.

Báðar kvinnufinalurnar er Sveinur Tróndarson fyrsti dómari, og sum annan dómara hevur hann Randi Larsen aftur at sær í morgin og Óla G. Samuelsen sunnudagin.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Gólvið skrædnaði

**FLOGBÓLTUR** Teraflex-gólvið fekk stóran skaða í Trongisvági fyri einari viku síðani, men í dag verður tað umvælt, so tað verður klárt til FM-finalurnar í morgin og sunnudagin

**Hilmar Jan Hansen**

Fólkini í Flogbóltssambandinum fingu næstan kaldasveitta, tá serliga Teraflex-gólvið fekk stóran skaða í Trongisvági fyri viku síðani, tá tað varð brúkt til FM-finalurnar hjá teimum yngru leygardagin, umframt at kvinnurnar TB og Fleyr spældu á tí sunnudagin.

– Skaðin hendi, tá gólvið skuldi takast av aftur, tí tað vísti seg, at klistrið, vit høvdu brúkt til at hefta gólvið við, hevði brent seg fast, so tað partvíst ikki vildi loysna frá gólvinum í sjálvari høllini, umframt at tað í støðum gjørdi, at Teraflex-gólvið skrædnaði, sigur Magnus Tausen, formaður í Flogbóltssambandinum.

– Hetta er sjálvandi ikki gott, og einar tvær av rullunum hava fingið stóran skaða, sum enntá er komin á næstan teimum ringastu støðunum, har hann kann koma. Men vit fara at gera alt fyri at umvæla og lappa tað, so tað verður væl spælandi á tí á Eiði um vikuskiftið. Vit skulu nokk klára tað.

At valið aftur í ár fall á Eiði, nú FM-finalurnar skulu spælast í morgin og sunnudagin, var ikki nøkur torfør avgerð hjá Flogbóltssambandinum at taka:

– Skipanin er tann, at vit skulu hava uttanveltaðan vøll í einari góðari høll, og í fjør gekst so mikið væl á Eiði, har tey gjørdu eitt gott arbeiði, at vit gjørdu av at royna tað aftur har. Tað síggja vit eisini fram til, sigur Magnus Tausen.

*hilmarjan@sosialurin.fo*